# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Illa hugsað hjá Huxa

Í blaðnum í gjár kom fólkakirkjan rættiliga á breddan, eftir at fólkafloksungdómar hava verið á stevnu hjá Konservativ Ungdom í Danmark, og har eru komnir upp á aðrar tankar um alment fíggjaðu fólkakirkjuna, sum Jørgen Niclasen, formaður Fólkafloksins tekur til.

Tað er áhugavert, at ungir og spírandi politikarar taka upp til kjak samfelagsviðurskifti, eisini slík eym mál, sum fólkafloksungdómar gera í hesum føri við føroysku fólkakirkjuna. Tað ljóðar eisini so tilforlátiligt og frælst at tosa um talufrælsi, skrivifrælsi og trúarfrælsi – og so postulera, at hin føroyska fólkakirkjan skal missa tær 10 milliónir krónurnar, sum kirkjan fær á fíggjarlógini. Men halló tit konservativu føroysku ungdómar ...

Hóast tað kann vera idéalið hjá summum, at statur og kirkja ikki skulu ganga hond í hond, so er tað veruleikin so at siga kring allan heimin. Sjálvt í USA, sum onga statskirkju hevur, hava kirkjur og samkomur meira at siga enn nakrastaðni - og kanska alt ov nógv, nettupp tí, at statur og kirkja/samkomur ikki ganga hond í hond, sum vit kenna tað um okkara leiðir.

Formaður Fólkafloksins mælir ímóti og vísir beinleiðis aftur tí, sum hansara ungu spírar føra fram og vísir á, at fólkakirkjan ger ymiskt arbeiði fyri landið, sum hon ger bíligari, enn landið hevði gjørt tað – og her hugsar hann eyðvitað um primerskrásetingina í kirkjubøkurnar.

Men føroyska fólkakirkjan er so nógv meira enn ein stovnur, sum førir protokoll fyri myndugleikarnar. Fólkakirkjan er grundarlagið undir stórum parti av mentan okkara, sum røkkur so at siga í hvønn krók í landinum. At siga alt fólkið er partur av fólkakirkjuni so ella so. Gamaní hava vit eisini fríkirkjur uttan fyri fólkakirkjuna - so um nakað skuldi verið pilkað við fíggjarliga grundarlagið undir kirkjuni í sambandi við frælsi, so var tað, at fríkirkjurnar vórðu leskaðar fíggjarliga við sama lutfalli sum fólkakirkjan. Tað mátti verið nakað fyri spírandi konservativan ungdóm at tikið upp.

Men at kjakast um religión og samfelag – og hvar skilnaður eitt nú skal ganga ímillum politikk og religión, tað er eitt áhugavert evni at kjakast um. Nógvir fordómar eru at jarða – frá báðum síðum.

Men hetta tiltakið frá Huxa – tað var helst ikki so væl hugsað kortini...

**Sosialurin**

## Røktarheimið yviri við Strond skal eita Boðanesheimið



**HALLA SAMUELSEN**
forkvinna í sosiala nevnd

Verkætlanin at byggja nýtt røktarheim yvir við Strond er nú komin so mikið langt, at mett varð neyðugt at geva heiminum eitt navn ella heiti. Við at geva verkætlanini navn tíðliga í tilgongdini, verður navnið beinanvegin brúkt í øllum samanhangum framyvir.

Vanligt er at geva røktarheimum navn, sum antin lýsir endamálið og/ella staðsetingina. Skotið varð tí upp, at røktarheimið verður nevnt Boðanesheimið.

Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæltu til at nevna nýggja røktarheimið Boðanesheimið. Sosiala nevnd samtykti 2. mars at taka undir við tilmælinum.

Navnið er lætt at bera fram, og hevur beinleiðis tilknýti til staðsetingina, og hóast at talan er um stóran bústovn, so gevur navnið heimligan og hugnaligan dám, sum eisini er við til at lýsa endamálið.

## 1. oktober verður eldradagur



**HALLA SAMUELSEN**
forkvinna í sosiala nevnd

Eldraráðið í Tórshavnar kommunu heitti í fjør á kommununa um, at ein dagur í árinum skuldi verða ásettur at vera dagur teirra eldru. Sosiala nevnd tók beinanvegin undir við áheitanini, og síðani hevur verið arbeitt víðari við ætlanini.

Sameindu Tjóðir samtykti fyrst í 90'unum, at 1. oktober skuldi vera altjóða eldradagur. Í grannalondum okkara hevur verið vanligt, at dagurin verður hildin, og tað eru eldraráðini, sum í stóran mun skipa fyri hesum. ST ásetir evnið fyri dagin, sum so er felags evni kring allan heim.

Bæði trivnaðarstjórin og sosialdeilarleiðarin mæltu til, at 1. oktober eisini hjá okkum verður dagur teirra eldru. Sosiala nevnd samtykti á fundi tann 2. mars at taka undir við tilmælinum. Við tiltakinum verða Tórshavnar kommuna og Eldraráðið partar av tí altjóða týdningarmikla arbeiði, sum setir fokus á umstøðurnar og lívsgóðskuni hjá teimum eldru.

Umsitingin fer nú saman við Eldraráðnum at fyrireika fyrsta eldradagin 1. oktober 2010.

# Selma fer aftur í skúla

**Selma Ellingsgaard, forkvinna í Starvsmannafelagnum, vitjar aftur Studentaskúlan á Kambsdali, har hon, eins og aðrir fakfelagsformenn, hevur gingið**

TÍÐINDASKRIV

Í kvøld, hóskvøldið, verður serlig listaframsýning og kvøldseta á Studentaskúlanum á Kambsdali.

Tað eru ung listafólk úr Norðoyggjum, Eysturoy og Norðstreymoy, sum sýna fram málningar, tekningar, fotomyndir og aðra list. Franskur býarpartur við fronskum tónleiki og øðrum forkunnugum fronskum servørum er karmur um framsýningina – høvi verður at keypa myndir og annað.

Framsýningin letur longu upp klokkan 18 við fernisering.

Fyrrverandi næmingurin, Selma Ellingsgaard, fer eisini at hugleiða undir yvirskriftini "Hvat er og ger ein forkvinna?"

Lestrarvegleiðari og HF næmingur greiða frá um HF lestur.

Á skránni eru eisini tíðindastubbar úr sermerkta Italia og úr jarðskjálvtarakta Kili; og harafturat verður tónleikur, sum næmingar, ið taka tónleik á hástigi, framføra, eins og Bernhard Brim og Dina og tær spæla og syngja.

Eisini verður kafé í kaffisteðginum í sambandi við at 1.HF savnar pening til námsferð, so høvi verður at keypa sær kaffi, te, saft og ymiskt leskiligt afturvið.

Tiltakið er alment og øll eru vælkomin.



*Selma Ellingsgaard*

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Jaspur Langgaard jaspur@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.